# ítróttur

Nr. 4 • hósdagur • 8. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Eingin sáttmáli skrivaður

**Hans Fróði Hansen sigur seg ikki hava skrivað undir sáttmála við íslendska Fram, og í løtuni tykist málið átøkt einum hurlivasa, har torført er at finna sannleikan í heildini, og har serliga B68 man kenna seg eitt sindur í villareið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Sjálvur sigur Hans Fróði Hansen seg einki kenna til, at hann skal hava gjørt sáttmála við íslendska Fram. Tað kennir B68 heldur einki til, men í Reykjavík sigur felagið, at tey hava ein sáttmála…*

*savnsmynd*

Sum vit skrivaðu í blaðnum í gjár, so var talan um álvarsligt brot á bæði føroyskar og altjóða sáttmálareglur, um Hans Fróði Hansen hevði skrivað sáttmála við Fram.

Felagið boðaði sjálvt á heimasíðuni frá, at teir hava gjørt trý-ára sáttmálar við Hans Fróða Hansen og Fróða Benjaminsen, men sambært B68-formanninum, Niclas Davidsen, hevði B68 so ikki leysgivið leikaran, og tó at samband hevði verið millum B68 og Fram, so var eingin semja enn funnin í hesum.

## Sigur seg einki skilja

Vit royndu bæði mánadagin og týsmorgunin at fáa fatur á Hans Fróða Hansen, at vita, hvørjar viðmerkingar hann hevði til málið, men tað eydnaðist okkum ikki. Men blekkið í blaðnum mundi neyvan vera stadnað, áðrenn Hans Fróði sjálvur setti seg í samband við Sosialinum

- Eg kann bara siga, at hetta kenni eg einki til. Sjálvur havi eg so ikki skrivað nakran sáttmála við Fram, og eg visti ikki av nøkrum, fyrr enn eg á døgurða týsdagin frætti, at eg hevði gjørt trý-ára sáttmála við felagið.

- Søgan er í stuttum tann, at eg í eina tíð havi gingið við ætlanum um at flyta til Íslands. Tað hevur B68 eisini verið kunnað um, og hetta hevur ikki havt nakað við Fram at gera. Tann áhugin er komin seinni, og eg havi verið vitandi um, at Fram hevur samráðst við B68 um at keypa meg leysan, men meira enn tað veit eg ikki, sigur leikarin sjálvur, og avvísir soleiðis staðiliga, at hann skal hava skrivað undir sáttmála, soleiðis sum felagið annars boðar frá.

## Torgreiddur sannleiki

Spurningurin tykist soleiðis í løtuni vera, hvar í øllum hurlivasanum sannleikin aftan fyri alt hetta liggur.

At síggja til, so átti talan at verið um álítandi tíðindi á heimasíðuni, sum er almenna síðan hjá felagnum. Íslendsku bløðini hava somuleiðis umrøtt tíðindini, og enn er so eingin í Fram, sum hevur havt nakran hug at avsannað tíðindini.

Tá Fram soleiðis meldar út, at teir hava gjørt sáttmálarnar, so vilja tey flestu kanska eisini halda, at nakað er um tosið. Hinvegin tykjast ikki øll tíðindini frá felagnum at vera eins álítandi. Sum Sosialurin hevur skilt tað, so skal talan í øllum førum ikki vera um trý-ára sáttmála, sum Fróði Benjaminsen hevur skrivað undir, men ein sáttmála fyri átta mánaðir. Og at undirskriftin á niðastu linjuna heldur ikki er sett enn.

## Nógvir spurningar

Í øllum førum bendir nógv á, at Hans Fróði Hansen hevur fingið tilboð um sáttmála fyri nakað av tíð síðani, og tað vil í øllum førum siga, áðrenn Fram og B68 eru vorðin samd um nakað gjald fyri leikaran. Eitt gjald, sum tey enn ikki eru samd um.

Í Sosialinum tann 12. november skrvaðu vit – við tilvísing til íslendsku bløðini - at bæði hann og Fróði Benjaminsen høvdu fingið tilboð um sáttmála, men ta ferðina vildi Hans Fróði tó ikki gera nakra viðmerking til hetta yvirhøvur. Skrivað varð eisini ta ferðina, at teir báðir leikararnir høvdu verið í Íslandi fyri at kunna seg um umstøðurnar. Nakað sum íslendska morgunblaðið eisini hevði lagt til merkis, og teir skrivaðu tann 13. november, at Fram í nakrar vikur hevði verið í samráðingum við teir báðar leikararnar.

So í løtuni er eitt sindur ilt at staðfesta, akkurát hvat er hent í hvørjum sambandi, men tað tykist í øllum førum víst, at toftamenn vilja hava nøkrum spurningum svaraðum.

Er tað so, at Fram uttanum B68 hevur sett seg í samband við leikara, so hava teir í øllum førum brotið tær reglur fyri leikaraskifti, sum FIFA hevur staðfest, og í so máta kann B68 eisini krevja endurgjald fyri hetta.

Hevur talan eisini verið um beinleiðis samráðingar – og ikki minst undirskriving av sáttmála – so hevur leikarin eisini sjálvur forbrotið seg móti reglunum, soleiðis sum vit greiddu frá í blaðnum í gjár.

Triði møguleikin er so sjálvandi eisini, at Fram við hesum roynir at leggja trýst á B68 við at skapa split millum felagið og leikaran. Ein taktikkur, sum eisini hevur verið nýttur í aðrastaðni runt í Europa. Hvørt hetta so er nakað, sum hevur stórvegis árin á stillføra B68-formannin er so eitt annað mál. Í øllum munnu tey flestu við kunnleika til felagsarbeiðið í føroyskum fótbólti ásanna, at Niclas Davidsen kann vera beistaktiga treiskur, tá á stendur, og at tú ikki skalt lata teg villeiða av spakliga lyndi hansara annars.



# Marjun er undangongufólk

**Seinasti dysturin í EM undankappingini í flogbólti í Luksemburg var nummar 100 hjá Marjun Kalsø. Hetta varð hon heiðrað fyri týskvøldið í býráðshøllini, har borgarstjórin, liðfelagar, familja, vinir og mong onnur tóku ímóti henni**

100 LANDSDYSTIR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Marjun Kalsø saman við trimum av sínum liðfeløgum, Anna Müller Jacobsen, Berit Norðoy og Sonja Ravnsfjall Kjølbro*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Klaksvík:** – Mær vitandi er tað ongin annar, sum hevur leikt 100 skrásettar landsdystir fyri Føroyar áður, og tí kann av sonnum sigast, at Marjun Kalsø er eitt undangongufólk – ikki bara í Klaksvík, men eisini í øllum landinum, segði Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri millum annað í røðu síni fyri Marjun í býráðshøllini týskvøldið.

Hann segði eisini, at ung ítróttarfólk kunnu hava Marjuna sum fyrimynd, tí hon hevur givið ítróttinum nógv hesi mongu árini.

Tá Steinbjørn var liðugur við sína røðu, segði Vera Larsen nøkur orð vegna Mjølnir.

Vera segði, at Marjun var so sanniliga ikki komin sovandi til hetta. Og hon greiddi frá, at tá Marjun ikki var til venjingar, so fingu tær ikki tað sama burturúr, tí hon koyrir á allatíðina.

Marjun fekk gávur frá býráðnum og frá Mjølni umframt fleiri blómutyssi.

Sjálv var hon púra málleys, so bilsin hon var. Hon visti av ongum áðrenn.

– Eg veit ikki, hvat annað eg skal siga enn takk, segði hon bilsin.

## Móttøka á ferjuleguni

Ætlanin var upprunaliga, at móttøkan skuldi vera klokkan 19, men av tí at Marjun var seinkað úr Vágunum, var hon sett at verða hálvanannan tíma seinni. Men hetta fingu ikki fólk at setast aftur fyri tað.

Móttøkan byrjaði á ferjuleguni, har eini 200 fólk ella meiri stóðu og bíðaðu til Dúgvan skuldi koma. Tá Marjun kom í land, byrjaði hornorkestrið at spæla, og gingu tey á odda niðan í býráðshøllina, har borgarstjórin tók ímóti.

Framvið vegnum stóðu børn og vaksin við stjørnukastarum, har tey gingu. Veðrið var av tí besta, og Marjun var sera bilsin og glað.

Nú hevur hon rundað teir 100 landsdystirnar og enn eitt mál er rokkið hjá henni. Hvat hennara næsta mál fer at verða hjá hesi virknu ítróttarkvinnu, tað er ikki gott at vita.

Ofta hevur hon fingið spurningin, nær hon fer at gevast, men so longi sum hugurin og orkan eru til tað, so er bara at halda fram.

# Kyndil leitar sær rumenskan styrk

**Ein rumenskur hondbóltsleikari royndarvenur í løtuni við Kyndli, men enn er ikki greitt, hvørt talan verður um sáttmála**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Endaspælið í bestu hondbóltsdeildini hjá monnum fer í gongd aftur um hálva triðju viku, og nú landsliðssteðgurin hevur sett ein kíla í, royna ymsu feløgini sjálvsagt at fyrireika seg sum best til týdningarmiklu dystirnar.

Vit hava áður nevnt, at Neistin til hetta verður styrkt við Heina Hanusarson, men eisini grannarnir úr Kyndli tykjast ganga við ætlanum um at fáa styrk til liðið.

Í øllum førum er hesa vikuna ein rumenskur leikari, sum venur við liðnum, men sum skilst, so er tó enn ikki avgjørt, hvørt talan verður um at gera sáttmála við leikaran.

Úr Kyndli frættist, at hetta við at fáa útlendskan styrk, var nakað, sum tey tosaðu um við kappingarársbyrjan, men at liðið síðani hevur víst seg at standa seg framúr væl, sum tað er.

- Eftirfylgjandi hevur hesin leikarin so sett seg í samband við okkum, og vit hava so einki havt ímóti, at hann hevur vant við okkum hesa vikuna. Men hvørt talan verður um sáttmála ella ikki, er tó alt ov tíðliga at staðfesta enn, sigur Jóannes Dalsgarð, sum er ein av teimum, sum tekur eina hond við í felagsarbeiðinum í Kyndli.

- Fyrst og fremst er sjálvandi avgerandi, at leikarin sýnir tær dygdir, sum eru neyðugar, og tað í sjálvum sær kann vera eitt sindur ringt at meta um eftir somikið stuttari tíð. Hartil kemur so eisini tað, at um vit ætla at knýta leikaran at felagnum, so eru ein rúgva av ymiskum formligum viðurskiftum, sum skulu avgreiðast, og so er spurningurin, hvussu langa tíð hetta fer at taka, sigur hann.

Soleiðis tykist tað í løtuni vera ivasamt, hvørt leikarin fer at styrkja um hópin hjá oddaliðnum seinasta helmingin av kappingarárinum, men hinvegin er tað neyvan til stuttleikar, at leikarin venur við teimum grønu, so tað verður helst spennandi at vita, hvussu hetta fer at spæla av.

# Nýggjur høvuðsstuðul hjá ÍSB

Fríggjadagin, 2. januar, skrivaðu ÍSB og Skemman undir sáttmála, sum við gildi frá 1. januar ger Skemmuna til høvuðsstuðul hjá sambandinum.

Skemman hevur ikki verið høvuðsstuðul hjá ÍSB áður, men teir hava verið partur av stuðulsbólkinum, og eitt nú vóru teir millum hollastu stuðlarnar til Special Olympics kappingarnar, sum fóru fram í Írlandi seinasta summar.

Hesi seinnu árini hevur tað annars við LÍV, sum hevur verið høvuðsstuðul hjá ÍSB, men tó at teir ikki longur eiga hetta heitið, so merkir tað ikki, at LÍV hevur slept endanum í so máta.

Framyvir vera teir partur av bólkinum, Aðrir stuðlar, sum eisini eru stórur partur av grundarlagnum undir virkseminum hjá ÍSB.

**-jm**